HOYVÍKAR SKÚLI

**Skúlastýrisfundur**

Hósdagur 12. sep. 2024 kl. 16.30 – 18.00

**Á fundinum vóru:** Rannvá Mortansdóttir, Jógvan Páll Fjallsbak, Laila Í. Hentze, Gunnvør Balle, Margith Lamhauge, Anna Maria Reinert Jensen, og Malan á Dul Nielsen

**Avboð:** Kristianna W. Poulsen

**Fundarleiðari:** Rannvá Mortansdóttir
**Skrivari:** Malan á Dul Nielsen

**Skrá:**

**1. Leiðslan kunnar:**

- Hølisviðurskifti

Hetta er skúli og skal brúkast til skúla fyrst og fremst. Hvussu gera vit so, tá ið aðrir felagsskapir ynskja at lána okkara hølir til eitthvørt?
Niðurstøðan er, at hesa avgerðina kann stjórin taka, tí tað lendir, í síðsta enda, á stjóranum, um upptakið gerst ov stórt.

**- Skipan av næmingaráði**

Margith Lamhauge fer at samskipa næmingaráðið, og Andrea S. Nolsøe kemur eisini at vera eitt sindur inn yvir. Tað verður eitt skeið fyri næmingaráðið seinni í sep. Eldru næmingarnir fara at fáa kunning um næmingaráðið í morgin. Annars er málið at hava næmingaráðsvalið í september hvørt ár. Av tí, at hetta er nýtt fyri báðar lærararnar, so eru vit, millum annað, eisini við fyri at læra. Næmingaráð hevur ikki verið ein inngrógvin partur av okkara skúla, men tað ætla vit, at tað skal vera.

**- Annað?**

Skýggjavanar. Vit hugsa, at næmingar ikki skulu hava telefonina við í skúla í heila tikið. Evt. hava eitt skeið fyri foreldrum, hvussu mann sum foreldur hevur kontrol á skýggjanýtsluni hjá børnunum.

Um vit skulu hava ein 100% telefonfrían skúla í tann forstand, at hon ikki skal við í skúla, so kunnu vit ikki steðga tí frá degi til dags, men longu nú fyrireika næmingar og foreldur upp á, at soleiðis verður tað um eitt ár.
Annars er tað betur nú viðv. telefonum í skúlanum. Tað hevur verið uppgávan hjá lærarunum alla tíðina at ganga eftir telefonunum, og tað er í roynd og veru nokk so møtimikið til tíðir.

**2. Innkomin mál:**

- Uppbýtið av fyrsta flokki (fyrispurning frá foreldrum)

Tað er blivið sagt til kunnandi fund, at skúlin er býttur upp eftir øki, men hetta er ikki gjørt í øllum umstøðum av serligum orsøkum, tí námsfrøðilig atlit eru tikin fram um grannaløg. Tó tekur leiðslan hetta til tín, so mann ikki sigur eitt til ein kunnandi fund, sum mann ikki fær gjøgnumført.

- Tímabýtið í H&L í 7. flokki (fyrispurningur frá foreldrum)

Foreldur í 7. flokki eru ónøgd við, at KT er ein partur av h/l fakinum. Mett er, at hetta tekur av tí kreativa. Hetta er ein roynd, og vit kunnu gera justeringar hjá onkrum næmingum, um onkur er serliga ónøgdur. Annars er telduførleiki eisini eitt handverk, og vit halda, at dannilsi treingir til á økinum.

- Jólahald og filmur 7. flokkur:

Vit gera ikki jólafilm í ár, og tað er eina mest tí, at vit hava ikki manning og orku á staðnum til tað. Hetta eru næmingarnir sjálvsagt keddir av, men leiðslan skal kunna teir um tað. Jólahaldið í ár verður skipað eftir øðrum leisti.

**4. Val: Hvar skal okkara fokus vera fram til valið/nýtt skúlastýri**

Skulu vit gera eitt skriv um, at Hoyvíkar skúli fer at mangla eina stovu komandi skúlaár? Tað kundi verið okkara fingramerki, áðrenn vit takka fyri okkum.
Annars hava vit, seinastu 4 árini, tosað nógv um skúlabygging og ferðslukanningar.
Næsta foreldraráð skal kanska vera betri kunnað um, hvat uppgávan inniber, og vit skulu heita á onnur foreldur at stilla upp

**5. Ymiskt:**

Skúlabyggingin – hvar eru vit?

Vit skulu vænta at vera her í minst tvey ár afturat, og so møguliga tá sleppa vit aðra staðni at bíða, meðan nýggjur skúli verður bygdur. Í roynd og veru eru vit í sama stað enn.

Fundurin lokin: 18:10